Tor Olav Trøim heldur nú fram seinsamallur, og er ikki longur í nevndunum fyri Seadrill og Marine Harvest. Mynd: EPA/CAROLINE SEIDEL

Seadrill og Marine Harvest-eigarar skiljast aftaná 19 ár

Jógvan Hugo Gardar

22.09.2014 - 17:24

Oljan.fo

Seinastu vikurnar hava søgur gingið um at ikki alt ruggar rætt í samstarvinum millum John Fredriksen og Tor Olav Trøim. Teir hava seinastu 19 árini havt eitt tætt samstarv og hava millum annað bygt upp tað vit í dag kenna sum Seadrill, sum millum annað eigur West Hercules-boripallin.

Teir báðir hava rokast á keypsskálanum sum teir heilt stóru drongirnir. John Fredriksen var íleggjarin, meðan Trøim var tann sum dugdi at spæla sær á keypsskálanum. John Fredriksen kemur upprunaliga frá tangaskipaverðini, og stendur á odda fyri Frontline.

Trøim er meir maðurin sum dugir at arbeiða á keypsskálanum. Saman hava teir so bygt upp feløg sum í dag eru skrásett bæði á Oslo Børs og á Wall Street í New York.

Fríggjadagin komu boðini um at Tor Olav Trøim var farin úr nevndunum í Archer og Seadrill. Í dag komu so boðini um at Trøim eisini er farin úr nevndini í alirisanum Marine Harvest. Við tí er Trøim nú farin úr øllum teimum feløgunum har Fredriksen í dag eigur meirlutan av partabrøvunum, og samstarvið teirra millum, ið hevur verið í 19 ár, er komið at enda.

Við hesum eru nøkur rokalig samdøgur farin afturum, og ríkasti maðurin í Noregi, 70 ára gamli John Fredriksen, og hansara 51 ára gamli hjálpari, Tor Olav Trøim, eru nú farnir hvør til sítt. Saman hava teir bygt upp birðir á keypsskálunum fyri meir enn 100 milliardir danskar krónur.

Orsøkin til stríðið skal vera eitt annað felag, Golar LNG, ið Trøim hevur stórt álit á, meðan Fredriksen ikki dámar hetta felagið, og hevur selt burtyurav sínum partabrøvum í felagnum, skrivar dn.no. Trøim hevur sett nógvar pengar sjálvur í hetta felagið.